## DAGSINS MEINING

# Forkunnug vitjan

Orka og umhvørvi eru spurningar, sum hava verið nógv frammi í miðlunum og tí almenna orðaskiftinum í eina tíð. Kanska so nógv, at onkur er farin at troyttast av tí og venda deyva oyrað til. Kortini velja vit at trúgva, at fyri føroyingar flest eru orku- og umhvørvismál so mikið grundleggjandi og álvarslig, at áhugin fyri at fylgja við og vera við í orðaskiftinum, er so mikið stórur, at Norðurlandahúsið vónandi verður fullsett mánadagin. Tá fáa vit nevniliga forkunnuga vitjan. Fyrrverandi danski orkumálaráðharrin, Svend Auken fer at leggja fram síni sjónarmið um hesi stóru mál. Tað er landsstýrismaðurin í orkumálum, Bjarni Djurholm, sum hevur boðið kenda danska politikararnum til Føroya. Innbjóðingin hevur samband við, at Vinnumálaráðið er í ferð við at orða ein yvirskipaðan orkupolitikk fyri Føroyar. Í fjør helt ein annar kendur dani, Bjørn Lomborg fyrilestur um orku og umhvørvi. Nú sleppa vit so at hoyra sjónarmið, sum standa í andsøgn við tey hjá Lomborg. Sunn og góð menning av demokratiinum.

Hóast vit eru fá í tali so umsita vit føroyingar eitt sera stórt og viðkvamt øki við ómetaliga stórum virðum – eitt tilfeingi, sum bæði skal troytast og varðveitast til komandi ættarlið. Vit koma at hugsa um ódeyðiligu orðini hjá kendum indianarahøvdinga um, at vit hava bara fingið náttúruna til láns frá okkara eftirkomarum. Og her koma spurningarnir um orku og umhvørvi so sanniliga inn í myndina. Tí hesi bæði eru so nær tengd at tilfeinginum/náttúruni.

Sum partur av altjóða samfelagnum og altjóðagerðini eiga eisini vit føroyingar at kenna okkara ábyrgd og leiklut í tí at varðveita eitt reint umhvørvi og harvið at troyta orkutilfeingið mest skynsamt. Vit hoyra, at Føroyar eru eitt tað landið uppá seg, sum dálkar mest, tá hugsað verður um at sleppa út $CO_2$. Stóri spurningurin er so eisini, hvussu vit ætla at fyrihalda okkum, tá og um vit finna olju og gass í undirgrundini og skulu til at taka hesi ráevni upp. Hvønn orku- og umhvørvispolitikkk ætla vit okkum til ta tíð at seta út í kortið!

Vit kenna flest øll sjónarmiðini hjá Lomborgistunum. Tí verður gott nú at hoyra Auken siga frá sínum sjónarmiðum. Hetta hendur so eisini í eini tíð, har nettupp yvirupphitingin fær part av skyldini fyri tær vanlukkur, sum júst í hesi løtu henda í Mexikanska Flógvanum, har ein ódn fyri og onnur eftir herja bygd øki í fleiri amerikonskum statum. Tað er so eisini lagnunnar speisemi, at hesar ódnir nú júst skulu raka USA so meint, sama USA, sum so staðiliga hevur gingið ímóti øllum royndum at minka um yvirupphitingina og annars umhvørvistiltøkum sum heild, ið restin av heiminum í stóran mun hevur gingið inn fyri. Tað eru nú kendir serfrøðingar, sum vilja vera við, at tað at ódnirnar nú eru so ógvusligar og týttar, stavar nettupp frá yvirupphitingini.

Áhugavert verður at hoyra, hvat Auken hevur at siga til hetta. Men tað er greitt, at tað er ongantíð rætt bara at peika eftir øðrum og ikki gera nakað fyri at sópa fyri egnum durum. Áhugavert verður at hoyra, hvat hesin royndi orku- og umhvørvispolitikarin vil siga ikki bara um altjóða dálkingina, eitt nú hana frá USA men eisini, hvussu vit føroyingar megna at halda reint í egnum húsum. Vælkomin til Føroya Svend Auken til eitt upplýsandi og vónandi gevandi orðaskifti.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Minkið trolveiðuna, vaksið um húkaveiðuna

**Absalon Absalonsen**



Undirritaði lurtaði við stórum áhuga eftir sendingini »Føroyar í dag«. Evni var: Hvussu ávirka høgu oljuprísirnir samfelagið.

At oljuprísirnir eru stór avbjóðing hjá fiskivinnuni var sjálvandi viðgjørt..

Ført var fram, at tann parturin av flotanum, sum verður minst ávirkaður av oljuprísunum, er húkaflotin, meðan trolaraflotin hevur størstu trupulleikarnar.

Hetta er ikki nýtt, hetta hava øll, sum fáast við fiskivinnu, vitað. Men við dagsins oljuprísum átti tað at havt munandi størri áhuga, ikki minst hjá teim ráðandi.

Hyggja vit at okkara fiskatilfeingi, so sæst, at nógv størri partur kundi verið veiddur við húki í mun til núverandi býti.

Upsi, toskur og hýsa eru fiskasløg, sum væl ber til at veiða við húki. Upsaveiðan undir Føroyum byrjaði við hondsnellum, og væl bar til, so leingi sum eingir trolarar órógvaðu upsan.

Størsta forðingin fyri at veiða upsa við snellu eru teir mongu trolararnir. Tað er ikki einans, tí teir veiða stórar nøgdir, men fyrst av øllum, tí teir styggja upsan, hann verður órógvaður í síni náttúrligu jagstran eftir føði, og tekur tí ikki húk.

Ein háttur at minka munandi um oljunýtsluna fyri hvørt kilo, vit veiða av fiski, hevði verið at minka um trolflotan og økt um húkaflotan í staðin.

Umframt at vit høvdu minka munandi um oljuútreiðslurnar, høvdu vit eisini kunna víst á minni svávulútlát í mun til veiddu nøgdina.

Vit høvdu fingið munandi betri fisk, tí fiskur, sum verður veiddur við húki, og verður blóðgaður í somu løtu, sum hann kemur á dekkið, fer altíð at hava munandi betri góðsku enn trolarafiskur, har ein partur av fiskinum hevur verið fleiri tímar í posanum, áðrenn hann kemur á dekkið.

Vit høvdu vit fingið fleiri arbeiðspláss á sjónum, og íløgan fyri hvørt arbeiðspláss hevði helst verið munandi minni.

Eg legði til merkis í sendingini, at ein av okkara fremstu politikarum hevði úttalað, at avbjóðingina av høgu oljuprísunum eigur vinnan. Hesum eri eg ikki samdur við honum í. Avbjóðingin viðkemur sanniliga eisini teim ráðandi.

Eingin ivi er um, at vit kunna veiða munandi størri part av okkara tilfeingi við húki, men tað skulu broytingar til. Tey, sum eru sett at skapa karmar um vinnuna, eiga at vera tey fyrstu at lata við seg koma.

Hevði ikki verið vert at umhugsa at latið upphøggingarstuðul til teir elstu trolararnar og stuðla vinnuni í eini øking av húkaflotanum í staðin millum annað við nýmótans snelluførum og samstundis vaksi um tey trolfríu økini á grunnunum.

# Tilfeingisgjald

**Páll Poulsen**



Í hesum mánaðinum hava vit hoyrt eitt nýtt orð, tilfeingisgjald. Onkur hevur fingið ilt av, at fiskiloyvi, eins og onnur loyvi skapa eitt ávíst goodwill í samband við skipasølu.

Um tú selir jørð ber til at lata seyð, maskinur, vitan o. a. sum goodwill. Men tað er lættari sagt enn gjørt, tí skulu fiskiloyvi/rættindi rinda hetta eykagjald, noyðast vit at javnstilla allar vinnugreinar. Eisini tey alment løntu, sum eru eitt sera ríkt tilfeingi.

Skulu tey sum hava skapað søgulig rættindi í fiskivinnuni rinda eyka skatt, so noyðast vit at javnstilla allar partar. T. d. noyðast alment lønt fólk at keypa sær eitt alment starv. Tað er lætt at ímynda sær, at starvsfólk í Svf ella Úf skulu keypa sær hesi, vit kunnu kalla tað »Kringvarpsrættindi«. Um tey røkja hesi størv líka so hegnisliga sum reiðarar, skiparar, maskinmenn og fiskimenn hava rikið skip, so kunnu tey í grundini selja hesi størv víðari við bæði goodwill, lunnindum og stórum vinningi.

Rithøvundar, sum hava troytt almennar grunnar, kunnu altíð fáa útskrivaðar serligar skrividagar, ið kunnu keypast á uppiboði. (Óheftir embætismenn í MMR kunnu standa fyri hesum). Ein sunn kapping hevði verið beinleiðis avleiðing av at javnstilla »tilfeingisgjaldið«, og summi høvdu fyri fyrstu ferð sloppið »til arbeiðis«. Tað er eisini gott fyri fólkaheilsuna, og skattatrýstið kann minka eini 18 til 25%.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14$^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.